## Úrslit og tíðir av Skála

| | | |
|---|---|---|
| **5-mannafør dreingir** | | |
| 1 | Blikur | 5.33.14 |
| 2 | Fípan Fagra | 5.37.18 |
| 3 | Spógvin | 5.39.12 |
| 4 | Sílið | 5.46.07 |
| 5 | Havfrúgvin | 5.49.19 |
| 6 | Tekla | 5.56.16 |
| 7 | Drekin | 5.58.11 |
| 8 | Tjaldri | 6.00.00 |
| 9 | Kollur | 6.06.06 |
| **6-mannafør kvinnur** | | |
| 1 | Páll Fangi | 5.51.22 |
| 2 | Víkingur | 6.03.08 |
| 3 | Lómur | 6.16.14 |
| 4 | Sundabáturin | 6.26.08 |
| **5-mannafør gentir** | | |
| 1 | Drekin | 5.41.11 |
| 2 | Blikur | 5.41.16 |
| 3 | Frúvin | 5.41.17 |
| 4 | Firvaldur | 5.43.16 |
| 5 | Sílið | 5.48.00 |
| 6 | Havfrúgvin | 5.51.01 |
| 7 | Fípan Fagra | 5.51.03 |
| 8 | Junkarin | 5.56.03 |
| 9 | Hvassi | 6.13.20 |
| 10 | Tjaldri | 6.18.05 |
| 11 | Falkur | 6.28.07 |
| 12 | Tekla | 6.30.22 |
| **6-mannafør menn** | | |
| 1 | Páll Fangi | 7.49.17 |
| 2 | Sundabáturin | 7.51.07 |
| 3 | Strálan | 7.57.21 |
| 4 | Víkingur | 8.03.07 |
| 5 | Lómur | 8.04.13 |
| 6 | Sølmundur | 8.05.11 |
| 7 | Hósvíkingur/Stjørnan | 8.19.07 |
| 8 | Hvessingur | 8.39.00 |
| **8-mannafør** | | |
| 1 | Argjabáturin | 7.49.11 |
| 2 | Nevið Reyða | 7.56.16 |
| 3 | Knørrur | 8.07.23 |

# Skála og Klaksvík eru við aftur

**Fyrstu ábendingarnar um støðuna hjá kappróðrarmanningunum vóru at síggja, tá ið tað í einki serligum líkindum varð róð á Skála, og tær siga, at Skála og Klaksvík ætla sær at kappast við tey bestu**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*



*Bæði hjá kvinnum og monnum vann Páll Fangi róðurin*

Annan leygardag verður fyrsti FM kappróðurin. Sum vanligt so verður hann á Norðoyastevnu í Klaksvík. Seinnu árini hevur fyrsta ábendingin um støðuna hjá kappróðrarmanningunum verið at fingið á bygdastevnuni á Skála. Henda stevnan var um vikuskiftið, og sunnudagin varð skipað fyri kappróðri. Líkindini vóru ikki av teimum bestu, men tað eydnaðist kortini at avgreiða allar róðrarnar.

Eingin kapping var millum 10-mannaførini, og luttøkan var ikki stór millum 8-mannaførini. Trý 8-mannafør vildu tvær vikur undan fyrsta FM-róðrinum vísa, hvussu tey eru fyri. Argjabáturin hevur verið millum teir fremstu nógvu tey seinastu árini, og hann tykist vera væl fyri í ár. Argjabáturin var góðar tvær bátslongdir frammanfyri Nevið Reyða, sum aftur var fleiri bátslongdir undan Knørri.

Á Skála verður mest tosað um fótbólt, men teir eru heldur ikki í kappróðri sørir. Seinnu árini hevur lítið verið at sæð til Skálabátin og 5-mannafarið Blik, men sunnudagin var dreingjamanningin við aftur og tað í stórum stíli. Blikur var meiri enn leysur av næsta bátinum. Næstfyrst var Fípan Fagra. Harvið vístu eisini dreingirnir úr Klaksvík, at teir ætla sær at vera við í FM kappingini. Fípan vann næstfremsta plássið í tættari kapping við Spógvan. Longi afturi í røðini vóru eitt nú Sílið, Tjaldrið og Havfrúgvin, sum tey seinastu árini hava vunnið nógv. Ivaleyst fara hesar manningarnar at vera við, har tað gongur fyri seg, tá ið teir hava vant tvær vikur afturat, og tað fer at verða kappast um FM stig.

Genturóðurin vann Drekin hjá Havnar Róðrarfelag. Talan var um tættastu kappingina av øllum. Drekin var bara eina sponn frammanfyri Blik av Skála, sum aftur var eitt evarska lítið sindur frammanfyri Frúnna. Ikki færri enn tólv gentumanningar luttóku á Skála.

Eisini í kappingini millum 6-mannafør við monnum var klaksvíksbáturin væl við. Páll Fangi vann sannførandi, men so skal beinanvegin leggjast afturat, at tað ikki vóru klaksvíkingar, sum mannaðu bátin. Tað vóru menn av 10-mannafarinum Eysturoyingi, sum róðu og vóru eina hálva bátslongd frammanfyri Sundabátin. Teir í Norðdepli/Hvannasundi vóru greitt nummar tvey. Hjá teimum verður spennandi at síggja, hvussu Norðoyastevnan fer at hilnast. Teir vóru greitt frammanfyri Stráluna. Einki var at síggja til Smyril, Gongurólv og Jarnbard, sum hava staðið seg væl.

Í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum var Páll Fangi fleiri bátslongdir frammanfyri Víking. Lómur og Sundabáturin róðu mest sum fyri seg sjálvar. Einki er at ivast í, at á Norðoyastevnu verður tað serliga frá Jarnbardi og Gongurólvi, at Páll Fangi fer at fáa stóra kapping.

# Talvið hesa vikuna

GM Nyback,T (2545) — GM Nikolic,P (2648)
5th IECC Antalya TUR (5), 20.05.2004

1.Rif3 d5 2.d4 Rif6 3.c4 e6 4.Ric3 Ribd7 5.Bg5 h6 6.Bh4 dxc4 (Móttikið dronningagambit) 7.e3 Rib6 8.Bxc4 (Áhugavert. Rie5 var ein annar møguleiki) 8...Rixc4 9.Fa4+ Bd7 10.Fxc4 Rc8 11.0—0 Be7 (Nakað passivt. 11...c5 er hvassari) 12.Rfd1 0—0 13.Fb3 b6 14.Rie5! (Svartur er undir trýsti) 14...c6 15.Rac1 Be8 16.Rc2 g5 (Viknar nakað um kongastøðuna, men er nakað alternativ?) 17.Bg3 Rih5 18.Rdc1 Rixg3 19.hxg3 Fc7 20.Rie4 (Svartur kann í løtuni ikki brúka sítt bispapar til nógv. Hvíta riddaraparið hinvegin er sterkt) 20...c5 21.f3 Kg7 22.g4 (Hvítur hevur góða tíð at byggja støðuna upp) 22...Rd8 23.Rid3 Bc6 24.Ridf2 Bd5 25.Fc3 (Svartur missur finnu. Leikar hann c4, svarar hvítur við b3 og Rid2) 25...f5 26.dxc5+ Kg6 27.cxb6 Fxb6 28.gxf5+ exf5 29.Fe5? (Ric5 væl betur) 29...Rf7? (Alneyðugt var at leika fxe4!) 30.Rig3 Fd6 31.Fxd6+ Bxd6



Støðumynd eftir 31...Bxd6

32.Rixf5! Rxf5 33.e4 Bxe4 34.Rixe4 Bf4 35.Rc6+ Kg7 36.R1c3 Be5 37.Rb3 Rf7 38.Rb5 Rd1+ 39.Kf2 Bd4+ 40.Ke2 Rg1 41.Rid6 Og Nikolic gavst. 41...Rxg2+ hjálpir ikki orsakað av at 42.Kd3 vinnur 1—0

# OL - liðið sett í august

**Ilt er í núverandi løtu at gita hvørjir seks telvarar umboða Føroyar við Talvolympiaduna, sum verður leikt í Mallorka í oktober/novembur. Stríðið um plássini er av álvara byrjað**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Talvsamband Føroyar hevur júst avgjørt, at OL-liðið verður sett fyrst í august mánaða. Hetta eru alneyðug tíðindi fyri telvararnir, sum stríðast um at koma á liðið, at teir nú hava greið boð um úttøkuna. Útisetar og áhugaðir yvirhøvur, kunnu nú t.d. brúka Politiken Cup í Keypmannahavn í juli til at betra um møguleikar sínir. Eisini er stór HT-open kapping í Havnini í juni.

– Nevndin hevur fingið at vita, at fleiri OL-kandidatar venja miðvíst til OL, og hava ætlanir um at taka lut í kappingum komandi mánaðirnir fyri at menna seg enn meira og náa einum hægri styrkitali. TSF miðjar eftir - sum vanligt hevur verið - at senda 6 telvarar avstað. Liðið verður endaliga sett fyrst í august mánaða, sigur Andrias Ziska, formaður í Talvsambandinum.

### Vísið andlit

Tískil er greitt, at telvarar hava komandi summarmánaðirnir at vísa sína dygdir, og sannføra nevndina at teir eiga pláss á liðnum. Neyðugt er nevnliga, at telvarar eru aktivir.

– Nevndin fer í stóran mun at leggja dent á aktivitetsstigið hjá telvararunum seinastu tíðina, ásannandi at styrkistøl harvið á besta hátt lýsa "dagsformin" hjá kandidatunum, sigur Andrias.

Talvsambandið fer at leggja skriv út á heimasíðuna (www.faroechess.com) um komandi OL-kappingina, har nomið verður serliga við úttøkuháttin.

### Sætta umboðið

Sannlíkt er, at John Arni Nilssen (2414), Heini Olsen (2337), Martin Poulsen (2310), Flóvin Tór Næs (2277) og John Rødgaard (2269) fáa pláss á endaliga liðnum. Avboð kunnu sjálvsagt spæla ein leiklut.

Tað eru serliga Hans Kristian Simonsen (2244), Olaf Berg (2242) og Ólavur Simonsen (2241, sum í løtuni stríðast um sætta plássið. Verður talan um avboð, so verður farið eftir telvarum í tyngra endanum av topp 10; Carl Eli N. Samuelsen (2213), Eyðun Nolsøe (2211) og Rógvi W. Rasmussen (2207). Tað er tó tíð enn hjá hesum nevndu telvarum at gera seg galdandi innan endaligu úttøkuna, og somikið langt aftanfyri topp 6 eru teir heldur ikki.

### Telving í Evropa

Í Sarajevo verður 34th Bosna Tournament í hesum døgum leikt. Alexei Shirov (2713) hevur lagt væl út, og hevur 4,5 stig eftir fyrstu fimm umførini. Hann hevur skúgva mótstøðuna til viks við mongum flottum álopstalvum. Ein sera áskoðaravinarligur og vældámdur telvari. Sergei Movsevian (2647) og Victor Bologan (2665) eru tó ikki langt aftanfyri. Vælkendi Ivan Sokolov (2690) er somuleiðis í ovari helvt, meðan illa gongst fyrrverandi HM-avbjóðaranum Nigel Short (2712), sum einans hevur hálvtannað stig.

Í Turkalandi verður Evropameistaraskapurin fyri einstaklingar somuleiðis leiktur í hesum døgum. Tíverri hevur hendan kapping ikki fingið status sum ein "superstórmeistarakappin". Telvarar velja aðrar kappingar framum, eitt nú kappingina í Sarajevo. Teir sterkastu telvararnir í heiminum hava ikki tikið lut í EM síðani kappingin fyrstu ferð bleiv leikt í 2000. Men vónandi verður EM einaferð ein siðvond kapping við alskyns superstórmeistarum.

Tó so, Vassily Ivanchuk við sínum 2716 ratingstigum prýðir væl um kappingina í ár. Hann hevur 5 stig av 7 møguligum, og er á einum deildum 3. plássi. Tannáringarnir David Navara (2602) og Shakhriyar Mamedyarov (2657) eru á odda við 5,5 stigum. Predrag Nikolic, sum vit føroyingar kenna væl, byrjaði væl, men varð steðgaður í fimta umfari, og hevur 4,5 stig. Talvið sum Nikolic tapti, er við í blaðnum.



NSÍ-ÍF 0-0:

# NSÍ kendi ikki sína vitjunartíð

**Skerdir fuglfirðingar fingu málleysan javnleik, tá ið tað enn eina ferð varð staðfest, at í NSÍ hava teir stórar trupulleikar at gera mál**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*Runavíkingar lógu framvið fleiri ferðir, men tað eydnaðist teimum ikki at skjóta málið, sum kundi givið teimum avgerandi fyrimunin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fuglfirðingar fóru væl nøgdir inn um aftur Gøtueið sunnudagin. Tað var ikki so undarligt. Teir høvdu megnað málleysan javnleik í fyrru hálvfinaluni. Nú skal avgerast fyrsta vikuskiftið í juli — tað ger tað ikki verri fyri teir, at tað veður á Varmakeldustevnuni - um teir skulu í fyrstu steypafinaluna síðani 1987, ella um NSÍ skal royna seg enn eina ferð. NSÍ var í finaluni fyri tveimum árum síðani, tá ið teir vunnu á HB.

ÍF megnaði ikki at fáa týdningarmikla útivallarmálið. Nú skulu teir ansa eftir, at NSÍ ikki fær mál í Fuglafirði. Um teir fara at fáa mál, so skal ÍF í hvussu so er skora tvær ferðir. Í landskappingardystinum í Fuglafirði 2. mai í 2. umfari vann ÍF 4-2 á NSÍ í Fuglafirði.

Fuglfirðingar vóru rættuliga skerdir, tá ið teir vitjaðu í Runavík. Bartal Eliasen var leikbannaður, tí hann í steypakappingini hevði fingið trý gul kort, og Hanus Eliasen er so mikið skaddur, at hann verður ikki tøkur aftur fyrrenn um einar tvær vikur.

Sum steinur omaná byrðu kendist tað, tá ið høvuðsálitið í ÍF álopinum, Magni á Lakjuni, noyddist at taka seg burturúr longu í 1. hálvleiki, tí hann var skaddur.

Tað var tætt og spennandi alla tíðina, og tað var serliga í 1. hálvleiki, at málmøguleikarnir vóru.

### Finna ikki meskarnar

NSÍ kendi ikki sína vitjnartíð á heimavøllinum. Teir løgdu bragdliga fyri, og fyrra partin av fyrra umfarinum megnaðu teir fleiri ferðir at spæla seg út um og aftur um ÍF verjuna. Innleggini vóru ikki so galin, men NSÍ fekk ikki mál. Teir tykjast ikki hava mannin, sum hevur nøs fyri at vera á rætta staðnum í røttu løtuni og sum samstundis hevur neyvleikan og er nóg kaldur, tá ið tað ræður mest um.

Jónstein Petersen, sum hesa ferð mannaði álopið saman við Andy Olsen og Helga L. Petersen, ið ikki er so málsøkin, sum hann hevur verið undanfarnu árini, hevði tvær góðar royndir, men Kartin Joensen tók sær væl av ti, sum kom innanfyri málkarmin. Mest spennandi støðan stóðst av, tá ið Kartin Joensen í ÍF málinum royndi at sparka burtur, og bólturin rakti í Helga L. Petersen og rullaði av vøllinum dygst skeivu megin stólpan — sæð við NSÍ eygum.

Ian Højgaard, sum var sentralur á miðvøllinum, skipaði NSÍ spælið saman við Alexandar Jovevic, ið tykist gerast alt betri fyri, eftir at hann leingi hevur verið skaddur. Teir báðir og eisini Sjúrður Jacobsen royndu við skotum úti frá, men tað segði tað sama hjá NSÍ, sum sýndi góðan hugburð og stíðsvilja í nærdystunum.

Siðsta korterið varð Óli Hansen, sum áður hevur verið álopsspælari, men sum í fjør varð umskúlaður til miðverja, settur fram í álopið. Tað tóktist bera størri tyngd við sær, men NSÍ megnaði ikki at fáa mál.

ÍF fótaði sær miðskeiðis í fyrra umfarinum, og eisini í 2. hálvleiki vóru teir væl við eina góða løtu, eftir at NSÍ so at siga hevði runnið hornini av sær. Høgni Zachariasen, sum er komin fyri seg aftur eftir drúgt tíðarskeið við skaða, hevði næstu ÍF royndina. Eftir uppspæl og út frá smekkaði hann til, og bólturin tók í tvørtræið aftanfyri Jens Martin Knudsen, áðrenn hann av vøllinum og út til málspark. Bárður á Lakjuni hevði møguleika at seta krúllin undir bóltin, men í góðari støðu í brotsteiginum valdi hann heldur at royna at temja, og so spurdist einki burturúr.

Høgni á Lakjuni varð settur á vøllin fyri systkinabarnið, Magna á Lakjuni. Hann stríddist saman við bróðrinum Bárði á Lakjuni, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa mál.

Ivaleyst verða fyritreytirnar hjá ÍF betri, tá ið teir skulu royna seg í seinnu hálvfinaluni. Um Magni, Bartal og Hanus tá fara at vera topptrimmaðir, og kann tað væl fara at vera, at NSÍ fer at fáa nóg mikið at hugsa um. Undir øllum umstøðum er lagt upp til sera spennani oyggjauppgerð, har tað skal finnast fram til, um tað nú skal vera ÍF ella NSÍ, sum skal spæla steypafinalu á Ólavsøku.

### FAKTA UM DYSTIN

**NSí-ÍF 0-0**
Fyrra hálvfinala í kappingini um Løgmanssteypið
**Dómari:** Lassin Isaksen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen — Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Dánial Hansen, Sjúrður Jacobsen — Alexandar Jovevic (74: Kári Hansen), Jústinus R. Hansen (84: Áki L. Hansen), Ian Højgaard — Gert Langgaard, Helgi L. Petersen (74: Andy Olsen), Jónstein Petersen
**ÍF:** Kartin Joensen — Árni Petersen, Viggo Johannesen, Áki Petersen, Rúni Elttør — Eyðolvur R. Petersen, Roy Róin, Høgni Zachariasen, Fritleif í Lambanum (Sverri Ellingsgaard, 90.) — Magni á Lakjuni (Høgni á Lakjuni, 34.), Bárður á Lakjuni (Teitur Joensen, 86.)

VB-HB 1-1 (1-0):

# HB syrgdi fyri góðari útgangsstøðu

**Hóast teir vóru frammanfyri eftir at hava spælt ímóti nógva vindinum, so megnaðu vágbingar ikki at vinna á HB, sum harvið tykist vera betri fyri enn vágbingarnir undan seinnu hálvfinaluni**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*HB eigur betru útgangsstøðuna, eftir at teir á nýggja undirlagnum í Vági fingu 1-1 javnleik móti VB*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Einki er avgjørt enn. So plagar sparikassamaðurin í Klaksvík at taka til í summum av mongu fínu sendingunum, sum hann hesi seinastu árini hevur verið meistari fyri í útvarpinum. Og skal haldast fram í kjalarvørrinum hjá honum, so er næsta staðfestingin, at tað er sera, sera, sera sannlíkt, at HB verður annar parturin í steypafinaluni. Eftir 1-1 í fyrru hálvfinaluni verður tað VB, sum skal leypa á, tá ið seinna hálvfinalan verður á skránni fyrsta vikuskiftið í juli. Um tað fer at enda málleyst ta ferðina, so verður HB samantaldur vinnari, tí teir hava skorað á útivølli.

VB var í Gundadali fyri stórari viku síðani. Ta ferðina endaði tað 2-1 til heimaliðið í uppgerð, har tað var nógv upp og niður. HB kundi rudduliga havt avgjørt í fyrra umfarinum, og eftir steðgin var VB omaná, áðrenn HB fekk sig-

Framhald á síðu 28